## Undirvísingar- og Mentamálstýrið
### Mentamáladeildin

# Leiðari til Altjóða Skrivstovu

Altjóðagerðin á útbúgvingarøkinum ger, at størri tørvur er á vitan um útbúgvingar, stuðulsmøguleikar og liviumstøður í øðrum londum, soleiðis at vit eru før fyri at geva lesandi nøktandi leiðbeining. Tørvur er eisini á øktum samskifti við útlendskar lærustovnar, og á at vit kunnu fylgja við í og umsita millumlanda avtalur og skipanir.
Undirvísingar- og Mentamálastýrið fer tí at seta á stovn Altjóða Skrivstovu, og verður í hesum sambandi søkt eftir einum akademiskum starvsfólki at verða leiðari fyri Altjóða Skrivstovuni.

**Starvið**
Høvuðsuppgávurnar hjá leiðaranum eru m.a.:
- savna vitan um hægri útbúgvingar-, granskingar- og stuðulsmøguleikar til lesandi
- virka fyri umbýti av lesandi millum Føroyar og útlendskar lærustovnar
- styrkja samskiftið við lærustovnar uttanlands
- ráðgeva viðvíkjandi góðskriving (meritering)
- ráðgeva lærustovnum í spurningum um útbúgvingar og viðkomandi viðurskifti annars í útlondum
- fáa sambond við leiðarar á øðrum altjóða skrivstovum
- upplýsa alment um lestrar- og stuðulsmøguleikar og gera kunningartilfar
- veita lesandi beinleiðis ráðgeving og praktiska hjálp til lesandi, serliga teimum sum ætla sær uttanfyri Danmark at lesa hægri lestur

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum m.a., at umsøkjararnir:
- hava útbúgving frá hægri lærustovni
- hava áhuga fyri umsiting
- hava áhuga fyri hægri útbúgvingum
- eru førar/ir fyri at arbeiða sjálvstøðugt og kunna taka avgerðir
- hava góð samstarvsevni og eru fyrikomandi

Harumframt er tað ein fyrimunur, at umsøkjararnir hava royndir úr øðrum starvi.

**Vit bjóða**
- Eitt ábyrgdarfult, áhugavert og fjølbroytt starv, har tú sjálv/sjálvur ert við til at skapa starvið
- Eitt starv, har tú ert við til at byggja nakað frá grundini
- Eitt starv, sum er spennandi við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti úteftir

Arbeiðið er á einum høgum fakligum stigi, og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

Tú kemur at arbeiða í einum spennandi umhvørvi við skiftandi uppgávum tætt saman við politisku myndugleikunum og stovnum innan undirvísing og mentan.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og viðkomandi yrkisfelag.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um aðalstýrið og stovnar tess.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum o.ø. skulu sendast til:

**Undirvísingar- og Mentamálastýrið**
**Postrúm 3279**
**110 Tórshavn**

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 4. september 2000, kl. 15.00.

Starvið verður at seta skjótast tilber.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Petur Petersen, aðalstjóra í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum ella Jóannes Dalsgaard, deildarstjóra í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum, á tlf. 35 50 50 ella á fartelefon 21 50 52.

***Undirvísingar- og Mentamálastýrið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*
*Uppgávurnar hjá **Altjóða Skrivstovuni** verða millum annað at veita Fróðskaparsetri Føroya og granskingar- og aðrar hægri lærustovnar tænastur innan samskifti við útlendskar hægri lærustovnar. Herundir at ráðgeva innan góðskriving o.a. Harumframt skal Altjóða Skrivstovan virka sum savningarmiðdepil fyri vitan um hægri útbúgvingar, granskingar- og stuðulsmøguleikar fyri lesandi. Altjóða Skrivstovan verður bygnaðarliga beinleiðis undir Undirvísingar- og Mentamálastýrinum. Skrivstovan fer at húsast saman Setursskrivstovuni hjá Fróðskaparsetri Føroya.*

## Fiskimálastýrið
### Fiskivinnustovan

# Starv sum fulltrúi á Fiskivinnustovuni

Søkt verður eftir einum fulltrúa til Fiskivinnustovuna.

Fulltrúin skal saman við leiðslu og øðrum fulltrúum í Fiskimálastýrinum serliga arbeiða við fiskiídnaðarmálum og fiskivinnuroyndum, herundir samskipa leiklutin hjá Fiskimálastýrinum í verkætlanum innan fiskivinnugransking. Møguligar broytingar í virkisøkinum kunnu verða gjørdar.

Tað verður sett sum krav, at umsøkjarar hava viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni. Harumframt er tað eitt krav, at umsøkjarar hava góðan kunnleika til føroyskt og enskt mál. Grundleggjandi royndir innan virkisøkini verður roknað sum ein fyrimunur.

Umsøkjarar eiga at vera samstarvsfúsir, at vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar, at kunna virka til lítar og á ein tryggan hátt í einum umhvørvi, har mál til tíðir hava nógvan skund.

Setanarøkið er Fiskimálastýrið og deildir í stýrinum, umframt onnur aðalstýri og løgmansskrivstovan.

Setanartreytir og løn verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Fyrispurningar starvinum viðvíkjandi kunnu setast Andras Kristiansen, deildarstjóra á telefon 353030.

Umsóknir við prógvum og viðmælum skulu verða sendar Fiskivinnustovuni, Yviri við Strond 17, Postrúm 347, 110 Tórshavn og skulu vera Fiskivinnustovuni í hendi í seinasta lagi mánadagin 25. september 2000, kl. 16.00.


KT-Centrum

TELDUSKEIÐ

Fyri byrjarar:

05-06 Sep.
- Tendra & sløkk+win98

07-08 Sep.
- Microsoft Word 2000

09-10.Sep.
- Internet+teldupostur

12-13.Sep.
- Internet+teldupostur

kostnaður:
Kr. 750.- um dagin
(1 dagur = 6 frálærutímar
+ 1 tíma døgurða)

Tekning á
Tlf. 32 23 00

KTC Í Miðbýnum



Fólk søkist

Fólk søkist til skósmiðjuna í SMS at arbeiða seinnapartar frá kl. 13.00-17.30 mánadag til fríggjadag.

Løn sambært avtalu.

Send eina skrivliga umsókn innan týsdagin 12.09.00.

Eisini ber til at ringja í skósmiðjuna tel. 315141 at frætta meira um starvið.

Skósmiðjan í SMS
Postboks 3166 • 110 Tórshavn • Tel. 31 51 41



Vit gera alt
URTAGARÐSARBEIÐI

• Grasvøllir • Planting • Viðlíkahald
• Seta gravsteinar upp v.m.
• Gera tún við flisum ella oljugrúsi
• Grevstur í sambandi við olljutangaskifti o.a.

Spyr - tað kostar einki!

Við 25 ára royndum hava vit roynt tað mesta

Fa. SÍMUN DALSGAARD
Boðanesgøta • FO-188 Hoyvík
Tel. 31 54 78 • Fartel. 28 21 00 • Fax 32 04 78




## Starv

# S K R I V A R I

Strandfaraskip Landsins (SL) søkja við hesum eftir skrivara til stjóraskrivstovuna at seta skjótast gjørligt.

Stjóraskrivstovan er ein stápsdeild undir stjóranum og skal sum høvuðsuppgávu verða leiðsluni til hjálpar.

Á SL er talan um eitt desentralt arbeiðsumhvørvi við nógvum eindum runt um í landinum. Hetta hevur m.a. við sær ein stóran tørv á umsitingarligari samskipan. Ætlanin er tí, at vanliga skrivarafunktiónin eisini skal virka sum ein samskipandi funktión, har miðað verður ímóti at skapa felags umsitingligar karmar.

SL hava í seinastuni knýtt eindirnar tættari saman við kunningartøkni. Hetta skapar betri fortreytir fyri at tryggja eina góða samskipan.

**Stjóraskrivstovan**
Stjórin á SL hevur ovastu leiðsluna og umsitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina av virksemi stovnsins.

Ábyrgdarøkið fevnir eisini um langtíðar ráðlegging við ábyrgd fyri samskipan av ymsu deildunum og virkisøkjunum.

Stjóraskrivstovan hevur ein týdningarmiklan leiklut at samskipa dagligu umsitingarligu uppgávurnar hjá leiðsluni. Harafturat skal deildin verða við í teirri menning og nýskipan, ið SL hevur fyri framman.

**Skrivarastarvið**
Høvuðsuppgávurnar hjá skrivaranum eru:
- Avgreiða mál vegna stjóra ella leiðslu
- Stýra og umsita journal, hølisviðurskifti, kundamóttøku, postmóttøku og samskifti annars
- Avgreiða telefon og kalendara
- Avgreiða klagur
- Verða við til at fyriskipa, samskipa og lata upplýsingar av ymiskum slag
- Fyrireika fundir og vitjanir
- Gera fundarfrágreiðingar
- Innsavna og seta upp ymiskt tilfar
- Viðlíkahalda formularar
- Rættlestur

Harafturat kemur skrivarin at taka sær av skrivarauppgávum í sambandi við ymsar verkætlanir.

**Førleikakrøv**
- Ástøðilig útbúgving innan fyrisiting og handil, t.d. HH ella tilsvarandi
- Helst royndir innan fyrisiting og sum skrivari
- Kunnleiki og royndir innan kunningartøkni/edv á brúkarastøði (td. teldukoyrikort)
- Helst kunnleiki til journalisering
- Góð evni at orða seg bæði skrivliga og munnliga á føroyskum, donskum og enskum
- Arbeiða sjálvstøðugt og málrættað
- Góð samskiftis- og samstarvsevni
- Álítandi og góðan røkjuskap

**Setanartreytir**
Talan er um eitt starv við spennandi avbjóðingum. Viðkomandi fær ábyrgdina av at menna eina samskipandi funktión og skapa felags umsitingarligar karmar. Starvið gevur góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

**Umsóknir**
Umsóknir við avritum av prógvum, ummælum, CV og tilvísingum skulu sendast til:
Strandfaraskip Landsins
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn
og skulu vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 11. september 2000, kl. 12.00.
Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Reidar Nónfjall, stjóra.
Tlf. 343000 ella e-mail: ren@ssl.fo

*Høvuðsuppgávan hjá SL er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá SL javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

STRANDFARASKIP LANDSINS

## Barnaansingin
### í
### Tórshavnar kommunu

Barnaansingin í Tórshavnar kommunu tekur sær av tilmeldingum og upptøku av børnum til dagstovn, dagrøkt og frítíðarskúla.

**Viðtalutíð**
Frá 4. september 2000 verður viðtala bert eftir avtalu. Viðtalutíð kann bíleggjast í telefonavgreiðsluni.

**Telefontíð**
Telefontíð er frá mán. til hós. millum kl. 9.00 og 16.00 og fríggjadag millum 9.00 og 15.00.

*Tórshavnar kommuna*



# Lærlingur
## til THE BODY SHOP í SMS

Vit søkja eftir lærlingi innan kosmetikk og húðrøkt til THE BODY SHOP-handilin í SMS, at byrja 1. oktober.

THE BODY SHOP handilsketan selur og veitir ráðgeving um vørur innan kosmetikk og húðrøkt. Í framleiðsluni verður dentur lagdur á nattúrligt tilfeingi eins og hugsað verður um umhvørvið.

Vit bjóða tær eitt áhugavert læripláss í einum spennandi og fjølbroyttum umhvørvi.

Tú ert ágrýtin og hevur hug og hegni til at veita kundum okkara eina góða tænastu. Tað er ein treyt, at tú hevur FHS ella HH.

Skrivlig umsøkn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 7. september 2000, og skal sendast til

THE BODY SHOP
Postboks 1126
SMS
110 Tórshavn

THE BODY SHOP


PC-Koyrikort




...ein góð íløga

PC-Koyrikortið er samansett av 7 modulum, og miðja skeiðini ímóti at brúkarin lærir at nýta telduna, og teir møguleikar teldan gevur.
Set teg í samband við Formula.fo, og vit geva tær eina nærri lýsing av hvat hvørt skeiðið inniheldur, og hvat tú kannst vænta av skeiðunum.

Nýtt skeið byrjar 18. september 2000

Grundleggjandi kunningartøkni
Kunningartøkni yvirhøvur
Stýriskipanin í eini teldu

Vanligastu forritini
Tekstviðgerð/Word
Rokniark/Excel
Dátugrunnur/Access
Framløga/Power Point

Samskifti
E-postur, internet v.m.

formula.fo
Tel: 311115
Fax: 317115
Stiðjagøta 5 & 11
100 Tórshavn

t-post: skeid@formula.fo
heimasíða: www.formula.fo




## Honda Accord 2,0 EXI

til sølu. Prísuppskot min. 110.000 kr. Við fylgir: nýtt Pioneer stereoanlegg virði 20.000 kr., sportsfelgur við dekkum umframt fýra nýggj dekk, originalfelgur við skálum.

**Tlf. 216460** og **221319**